UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **3. desember 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-58**

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-091/2021 frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu, til Jenis av Rana, landsstýrismann í uttanríkis og mentamálum.

Viðvíkjandi møguleikum hjá heilsurøktarum og námsfrøðihjálparum at lesa víðari.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvat skal til fyri, at heilsurøktarar kunnu lesa víðari til sjúkrarøktarfrøðing og námshjálparar til námsfrøðing?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at skipa fyri, at heilsurøktarar og námshjálparar kunnu fáa uppsamlingsskeið við tí, tey mangla, so tey kunna lesa víðari?
3. Hvat er kostnaðurin av hesum?

Svar

Til 1: Útbúgvingarnar til sjúkrarøktarfrøðing og námsfrøðing á Fróðskaparsetri Føroya eru bachelorútbúgvingar, og upptøkukrøvini eru ásett í kunngerð nr. 98 frá 2021 um upptøku til lestur á Fróðskaparsetri Føroya. Í § 1 er ásett, at gymnasial miðnámsútbúgving er upptøkutreyt.

Útbúgvingarnar til heilsurøktarar og til námsfrøðiligan hjálpara eru ikki gymnasialar og lúka sostatt ikki upptøkutreytina. Ein gymnasial útbúgving er almennandi og lestrarfyrireikandi og gevur næminginum fakligt grundarlag fyri hægri lestri og framhaldandi útbúgving. Lærugreinarnar á hesum útbúgvingum eru á ávikavist A, B og C stigi. Útbúgvingarnar til heilsurøktara og námsfrøðiligan hjálpara geva næmingunum yrkisfakligan førleika á teirra økjum. Í ávísan mun geva hesar útbúgvingar eisini næmingunum almennan lestrarførleika, ið er grundarlag undir víðari útbúgving við tað, at ávísar lærugreinar eru á A, B og C stigi, men tær uppfylla ikki treytina fyri samlaða talinum av lærugreinum á gymnasialum stigi.

Fyri at hesar útbúgvingar skulu geva atgongd er sostatt tørvur á, at gera tær gymnasialar og lestrarfyrireikandi.

Til 2: Seinastu tíðina hevur verið arbeitt við at fyrireika ein lærugreinapakka til næmingar, sum frammanundan hava eina útbúgving sum heilsurøktari, námsfrøðiligur hjálpari ella annað. Ætlanin er, at hesin lærugreinapakki skal innihalda tær lærugreinar og lærugreinastig, sum samlað eru kravd í sambandi við upptøku á Fróðskaparsetri Føroya.

Til 3: Enn er kostnaðarmeting ikki gjørd av einum slíkum lærugreinapakka.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður